# Tørvur á hjálp til o

**Á Ríksissjúkrahúsinum í Keypmannahavn er eitt sentur fyri neyðtøkuoffur. Har verður ikki gjørdur munur á, um ein kvinna, ið er vorðin neyðtikin vil melda ella ikki. Tær fáa allar sama tilboð**

NEYÐTØKA

*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Karin Sten Madsen er sosialráðgevi og Karin Helweg-Larsen er serlækni. Báðar arbeiða á sentrinum fyri neyðtøkuoffur á Ríkissjúkahúsinum.

– Vit taka royndir av teimum kvinnum ið eru vorðnar neyðtiknar, síðan hava tær møguleika fyri at fara heim at hugsa seg um, um tær vilja melda ella ikki. Um tær seinni velja at melda, liggja allar royndirnar har, bæði gynekologisku royndirnar og royndir av klæðunum og tí eru øll spor tryggjað.

– Tað eru góðir møguleikar fyri, at starvsfólk á Landssjúkrahúsinum kunnu koma til sentrið fyri neyðtøkuoffur á Ríkissjúkahúsinum at læra av okkara royndum. So at tey kundu fingið eitt líknandi tilboð í Føroyum, sigur Karin Helweg-Larsen,



*Karin Sten Madsen er sosialráðgevi og Karin Helweg-Larsen er serlækni á sentrinum fyri neyðtøkuoffur á Ríkissjúkahúsinum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fyrstu 48 tímarnir eru avgerandi

**Um neyðtikin kvinna ikki meldar neyðtøkuna til løgregluna innan 48 tímar, verður hon ikki kannað, tí fara øll prógv fyri einki.**

*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Tá ein kvinna er vorðin neyðtikin og vendir sær til løgregluna, verður neyðtøkan meldað sum eitt og hvørt annað mál.

Um neyðtøkan var framd minni enn 48 tímar frammanundan, verður kvinnan send til gynekologiska kanning fyri at tryggja møgulig spor, ið kunnu nýtast sum prógv.

Sporini eru til dømis, DNA, sáð, hár og riftir. Á klæðunum ið kvinnan var í, kann prógv eisini finnast. Um kvinnan hevur sjónlig merki á kroppinum, so sum blá merki, riftir, blá eygu ella hár er roytt úr, verða myndir tiknar av hesum.

Besti møguleikin er at finna prógv um neyðtøkan varð framd minni enn 24 tímum frammanundan. Og klæðini skulu eisini kannast skjótast gjørligt, tí DNA kann eisini koma frá øðrum støðum.

Um ein kvinna hevur brúk fyri meiri enn 48 tímum at umráða seg í, áðrenn hon velur at melda, verða ongar royndir gjørdar. Verður bíðað við at melda, kann tað vera sera ringt at útvega prógv til sakarmálið. Tá endar tað ofta við, at orð stendur móti orði, tí tað eru sjáldan vitni til neyðtøkumál.

Grundin til at kvinnan ikki kann fara á sjúkrahúsið og tryggja prógvini og síðan kann fara heim at avgera um hon vil melda, er at landssjúkrahúsið hevur gjørt av, at tey ikki vilja nýta pening og læknar at tryggja prógv, ið møguliga ikki verða nýtt.

## Brot á straffilógina

| | |
|---|---|
| Siðamisbrot, m.a. neyðtøka, ið var meldað til løgregluna | 2000 – 28 |
| 1997 – 23 | 2001 – 21 |
| 1998 – 25 | 2002 – 42 |
| 1999 – 38 | 2003 – 14 |
| | 2004 – 15 |
| | 2005 – 28 |

*Modelmynd: Jens Kristian Vang*

